LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

Løgtingið

**Svar**
**uppá**

**skrivligan fyrispurning nr. 47/2019 eftir tingskipanini § 52a til Bárð á Steig Nielsen, løgmann, frá Beintu Løwe Jacobsen, løgtingsmanni, um skjøl í sambandi við fullveldis-samráðingarnar**

**Fyrispurningurin er soljóðandi:**

1. Nær fer løgmaður at almannakunngera øll skjøl, undir hesum eisini fundarfrágreiðingar, í sambandi við sonevndu fullveldissamráðingarnar millum landsstýrið og donsku stjórnina í árinum 2000?
2. Um løgmaður ikki ætlar at almannakunngera skjølini og fundarfrágreiðingarnar frá fullveldisamráðingunum, hvør er so orsøkin, og hvørjar eru grundgevingarnar fyri hesum?
3. Eru fullveldissamráðingarnar framvegis í gongd, sum annars hevur verið ein grundgeving fyri ikki at lata innlit í skjølini?

**Svar:**

**Til spurning 1, 2 og 3.**

Tað er ikki vanligt, at løgmaður av sínum eintingum almannakunnger skjøl úr stóru skjalagoymsluni í Tinganesi. Hinvegin kunnu umsøkjarar eftir áheitan fáa atgongd til skjølini eftir reglunum í innlitslógini.

Seinastu 20 árini hava fleiri umsóknir verið um innlit í "fullveldismálið", sum umsøkjarnir vanliga kalla tað. Løgmansskrivstovan hevur svarað, at tá ið fullveldismálini eru so sera nógv í tali, er neyðugt hjá umsøkjaranum at koma við einari neyvari umbøn, har tað er nágreinað, hvørji skjøl í rúgvismikla journalyvirlitinum, umsøkjarin vil hava hendur á. Hyggja vit burtur frá nógv umrøddu fundarfrágreiðingunum, hevur eingin umsøkjari nakrantíð søkt um innlit í ítøkiligt skjal, og tí hevur Løgmansskrivstovan ongantíð viðgjørt nakra ítøkiliga umbøn eftir reglunum í innlitslógini.

Nógv umrøddu fundarfrásagnirnar hava sína egnu søgu.

Umsøkjari hevur ikki rættarkrav uppá innlit, og higartil hava mínir undanmenn í løgmansembætinum noktað at givið meirinnlit í fundarfrágreiðingarnar.

Eg ætli nú at geva meirinnlit í fundarfrágreiðingarnar í sambandi við fullveldissamráðingarnar millum landsstýrið og donsku stjórnina í árinum 2000.

Tað kemst av, at eg haldi, at tá ið 20 ár eru liðin síðani seinasta fund í fullveldissamráðingunum, ber til av røttum at siga, at fullveldissamráðingarnar eru liðnar. Eisini eri eg av teirri sannføring, at tá ið ein fyrrverandi embætismaður á heysti í 2016 gav eina bók út, har trúnaðarupplýsingar í hópatali vórðu almannakunngjørdar, so hevur hvør einstakur føroyingur krav uppá sjálv/ur at fáa møguleikan at lesa skjølini og taka støðu til tey á egnum grundarlagi.

Í Tinganesi, 30. januar 2020

Bárður á Steig Nielsen
løgmaður